inni - trygt og ómaksleyst til hús www.inni.fo



# Nýggj hús við panoramaútsýni í Miðvági











**Tú sært tað við tað sama. Húsini eru marglætiskend og heilt serstøk. Tey standa sera væl fyri í Miðvági og útsýnið er einastandandi.**

### Tú kemur til bygdina

Tú snarar av við Kirkjuna og Politistøðina koyrir fram og snarar inn á Gerðisveg – ein nýggjur vegur við fleiri nýbygdum húsum. Her eru eini hús, ið hóska til landslagið og umhvørvið, eins og tey eru til bæði ungu familjuna og til tey, ið eru vorðin eitt sindur eldri og vilja hava eini praktisk hús í einari hædd. Tú kanst eisini velja at trýsta á knøttin til fjarstýrda garaguportrið og koyra bilin beinleiðis inn í sera snøggu garaguna, so tú ikki verður vát/ur í illsliga veðrinum.

### Stílur og snið

Fert tú víðari inn í grovkøkin / bryggersið / vaskirúmið, møtir tú einum sniði, ið er fjálgt og hugnaligt, men við einum stíli, ið er reinur og strammur. Húsini hava ikki bara eitt gott signalvirði, men eru eisini sera góð at búgva í. Tú kennir teg heima alt fyri eitt. Tey eru nýmótans innrættað, og alt er, sum tað eigur at vera. Eisini eru tey sera væl bjálvað, og tað merkir tú skjótt á oljurokningini. Alt er sera ljóst og snøgt, væl bygt og úr sera góðum tilfari. Allar nýmótans innleggingar eru so sum ventilatiónsskipan, sentraldustsúgvari, parabol- og antennuskipan og samanbundnu roykvarnarnir samvirka og kunnu ringja til tína telefon.

### Ljós og luft

Fert tú víðari inn í køkin / alrúmið / stovuna, fært tú nógva ljósið inn í alt rúmið. Klárt er at seta brenniovnin til at gera veturin fjálgari og gera terassu / útigólv út frá stovuni til at gera summarið svalari.

### Enn meira pláss

Fert tú longur inn í húsini ella inn ígjøgnum høvuðsdyrnar og inn í gongina, finnur tú eitt rættiliga stórt hjúnarrúm við klædnarúmið og egnum baðirúmið. Frá gongini eru eisini 2 stór kømur við egnum baðirúmi, ið eisini er gestabaðirúm.

### Umhvørvið

Húsini standa í náttúruvøkrum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg har fleiri ungar familjur búgva. Har er sera veðurgott og góður sólargangur. Útsýnið er frálíkt og einki kemur upp fyri. Stutt er til nýggjan barnagarð, skúla, bátahyl, fótbóltsvøll, læknamiðstøð, busssamband og handlar – alt innanfyri 100 – 300 metrar, og 5 min. er á flogvøllin.

## Fakta:

**Adressa:** ......... Gerðisv. 7, Miðvágur
**Býggiár:** ......... 2007
**Hæddir:**.......... 1
**Gólvvídd:** ....... 145 + 30 = 175 m²
**Grundøki:** ...... 551 m²
**Prísuppskot:**... kr. 1.800.000,00



inni

P/F Inni | Niels Finsens Gøta 37 | P.O. Boks 364 | FO-110 Tórshavn | inni@inni.fo | Tlf. 320 410 | Fax 320 510